# Kaj Leo fær stuðul

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landsfundur Sambandsfloksins, sum hesaferð varð hildin í Leirvík, er annað hvørt ár í Havn og annaðhvørt ár í ymisku valdømunum kring landið. Tó verður fundurin vanliga eisini hildin í Havn í einum valári.

**Kaj stuðlaður**

Helgi Abrahamsen, floksskrivari hjá Sambandsflokkinum, sigur, at landsfundurin gav formanni floksins og formanninum í tingbólkinum, Kaj Leo Johannesen, sín fulla stuðul.

- Jú, eg haldi, vit í stuttum kunnu siga, at Kaj Leo fekk herðaklapp fyri sítt arbeiði sum formaður. Nakrar rembingar vóru eftir fólkatingsvalið, men eg haldi ikki, at øll vóru so fegin um alt, sum sagt varð.

Helgi sigur, at fólk sum heild vóru positiv á landsfundinum og vístu góðan vilja til at standa saman um flokkin og floksformannin.

- Einki mótvalevni var til formanssessin, ei heldur til sessin sum næstformaður. Tí halda Kaj Leo Johannesen og Alfred Olsen fram í sínum álitisstørvum fyri flokkin sum ávikavist formaður og næstformaður, bæði í flokkinum og fyri tingmanningina.

**Úrslitið eftirmett**

Helgi sigur, at sjálvt úrslitið av fólkatingsvalinum var ikki so nógv frammi á landsfundinum, tí hetta hevur fingið sína eftirmeting, eitt nú í landsnevndini.

- Landsfundurin vísti, at fólk vilja standa saman við tí endamáli at fáa sum best burtur úr – flokkinum og fólkinum at gagni, sigur floksskrivarin, Helgi Abrahamsen.

Eftir landsfundin, har seinasti røðarin var Lars Løkke, sum er danskur innanríkis- og heilsumálaráðharri, varð skipað fyri veitslu, har eini 120 fólk sótu til borðs.

Við á veitsluni vóru eisini hjúni, Lars og konan, Sólrun, sum er føroysk.

# Seta okkum í undantaksstøðu

**– Tær kreppuloysnir, sum vórðu framdar í nítiárunum, skulu takast av, tí spurningurin er, um hesar ikki eru við til at seta okkara vinnulív í undantaksstøðu, segði Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum á landsfundi í Leirvík**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Tann politiska uppgávan skal flytast. Í staðin fyri at vera ein partur av vinnulívinum, skal orkan brúkast til at skapa nøktandi karmar. Vinnuligu kreppuloysnirnar, sum framdar vórðu í nítiárunum, skulu takast av, tí spurningurin er, um hesar ikki eru við til at seta okkara vinnulív í undantaksstøðu.

Hetta segði formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, á landsfundi floksins í vikuskiftinum.

Hann vísti á, at ein heildarætlan eigur at gerast, sum hevur til endamáls at einskilja allar almennar fyritøkur og allar almennar grunnar, sum eru í beinleiðis kapping til privata vinnulívið, og sum virka í einum marknaðarumhvørvi.

- Tað, sum vit uppliva, tá ið talan er um einskiljingar, er ein alt ov ógreið útmelding frá landsins myndugleikum. Hetta er ein orsøkin til, at tey fólk, sum varða av hesum arbeiðsplássum, stundum kenna seg ótrygg, segði formaður Sambandsfloksins.



*- Føroyar eru í løtuni í ferð við at leggja spíran til altjóðagerðina, og hetta hevur eins stóran týdning fyri okkum í dag, sum veganetið hevði í fimtiárunum, segði Kaj Leo Johannesen*

**Altjóðagerð**

Ein stóran part av formansrøðu síni tosaði Kaj Leo um altjóðagerð, og hann legði dent á, at framtíðin er ikki ein hóttan, men ein "fantastiskur møguleiki fyri menning av tí einstaka menniskjanum", sum hann tók til.

- Føroyar eru í løtuni í ferð við at leggja spíran til altjóðagerðina, og hetta hevur eins stóran týdning fyri okkum í dag, sum veganetið hevði í fimtiárunum.

Hann segði, at tey lond og teir politikarar, sum megna at geva borgarum og vinnulívi bestu treytir og besta umhvørvið, vinna altjóða kappingina um arbeiðspláss.

– Einstaklingar og vinnulív skulu hava somu møguleikar sum okkara kappingarneytar at virka í einum frælsum umhvørvi. Neyðugt er, at vørur, kapitalur, arbeiðsmegi og tænastur kunnu flytast frítt um landamørk uttan forðingar.

**Føroyar og ES**

Formaður Sambandsfloksins segði, at sum samfelag skulu vit sleppa okkum av við allar marknaðarforðingar og fáa lut í teimum fýra frælsunum hjá ES.

– Men eg vil leggja dent á, at hetta saktans kann lata seg gera uttan fullan limaskap í ES, segði Kaj Leo Johannesen, sum vísti á, at eitt nú Áland hevur eina skipan, sum hann helt, at vit eisini kundu fingið, um rætt verður atborið.

# Ríkisrættarligi politikkurin eftir Sambandsfloksins leisti

**– Hægri skattur og verri tænasta er avleiðingin av minkandi heildarveitingini, sigur Sambandsflokkurin, sum hevur felt á blað nakrar niðurstøður**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Gestarøðari á landsfundi Sambandsfloksins var Lars Løkke, sum er danskur innanríkisráðharri. Á myndini eru eisini kona hansara, Sólrun og Lisbeth L. Petersen*

Á landsfundinum í Leirvík, 1. og 2. apríl, gjørdi Sambandsflokkurin sær nakrar niðurstøður.

Flokkurin fegnast um úrslitini, sum rokkin eru higartil í valskeiðnum og heldur, at einki veruligt alternativ er til sitandi samgongu. Fullveldispolitikkurin er lagdur á hillina, og grundarlagið undir landsins politikki á ríkisrættarliga økinum er nýskipanaruppskot Sambandsfloksins. Flokkurin fegnast um góða og uppbyggjandi samskifti, sum aftur er millum ríkispartarnar.

Sambandsflokkurin sigur seg vilja streingja á at fáa gongd á einskiljingar fyri at minka um almenna leiklutin í vinnulívinum. Einstaklingurin eigur at fáa høvi at vísa, hvat hann dugir, og góða úrslitið hjá einstaklinginum fer at koma samfelagnum til góðar.

Flokkurin fegnast um, at ótálmaði vøksturin, sum verið hevur í rakstrarútreiðslunum á løgtingsfíggjarlógini seinastu árini, er steðgaður, og somuleiðis eru eykajáttanarlógirnar nógv tálmaðar.

Sambandsflokkurin heldur tað vera eitt politiskt mistak, tá ið fullveldissamgongan minkaði heildarveitingina úr ríkiskassanum og vísir á, at tað er føroyski skattgjaldarin, sum noyðist at rinda fyri hetta við hægri skatti og verri tænastu.

**Almanna-og heilsumál**

Flokkurin vísir á, at bíðitíðin fyri at fáa viðgerð á sjúkrahúsunum, eitt nú hjá eygnalækna, er alt ov long, og eigur at verða stytt. Sjúklingar skulu kunna fáa viðgerð antin innan- ella uttanfyri ríkisfelagsskapin – privat ella alment – og peningurin skal fylgja sjúklinginum.

Eingin føroyingur skal noyðast út á arbeiðsmarknaðin, tá ið hann er farin um tey 67. Tann einstaki skal sjálvur hava møguleika at velja, um hann heldur fram ella velir at gevast.

Í niðurstøðu síni, sigur Sambandsflokkurin seg vilja virka fyri, at væferðin verður ment – at vinnulívið verður styrkt, og at Føroya fólk fær fjøltáttaðar møguleikar í altjóða høpi.

– Marknaðarkreftirnar skulu fáast at virka betur, eins og einkarættir eiga at verða avtiknir, sigur Sambandsflokkurin í niðurstøðu síni á landsfundi floksins.

# Eygleiðarastøðan hjá blaðstjóranum er nú strikað

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á landsfundi Sambandsfloksins varð samtykt ein broyting í reglugerðini fyri flokkin. Talan er um regluna, sum segði, at blaðstjórin á Dimmalætting hevði eygleiðarastøðu í landsnevnd floksins.

Henda reglan er nú strikað.

Helgi Abrahamsen, floksskrivari, sigur, at hetta var ein leivd frá teirri tíðini, tá ið Dimmalætting varð roknað sum málgagn Sambandsfloksins.

**Lítlan týdning**

- Í praktis fær henda broyting ikki so stóran týdning, tí verandi blaðstjóri á Dimmalætting, Ingi Samuelsen, hevur ta støðu, at hann møtir ikki á hesum fundum kortini, sigur floksskrivarin, sum eisini er skrivari hjá tingmanning Sambandsfloksins.